Heimsins størsta tíðindastova ger innsløg um Føroyar

-Tit hava eitt ómetaliga vakurt land, og fyri ein sjónvarpsmann er stuttligt at gera upptøkur í slíkum landslagi. Litirnir eru sterki, og eg havi fingið nakrar av mínum bestu myndum nakrantíð á ferðini í Føroyum, sigur David Notman-Watt.

Ein maður frá heimsins størstu tíðindastovu, Associated Press, hevur seinastu dagarnar verið í Føroyum og gjørt innsløg, sum skulu vísast í sjónvarpi kring allan heim. Sjálvstýri og olja eru evnini

SAMRØÐA
Heri á Rògvi/
Eyðun Klakstein

Tá Brødrene Olsen fóru á pallin leygarkvøldið, fylgdi ein maður við einum upptøkutóli teimum. Fólk flestu hildu, at hetta var ein maður, sum teir báðir høvdu tikið við sær til Føroya, men so var ikki. Maðurin, David Notman-Watt, er nemliga frá Associated Press(AP), og var tað av tilvild, at hann valdi at fylgja brødrunum.

Associated Press er heimsins størsta tíðindastova, og er hon yvir hundrað ára gomul.

Fyri sløkum fimm árum síðani, so fór AP eisini í holt við at gera sjónvarpssendingar. Hetta var eftir, at teir keyptu WTN, sum fleiri óivað kenna. Tað er to ikki soleiðis, at teir hava eina sjónvarpsrás sjálvir, men heldur verður gjørt sum við tí skrivaða tilfarinum, t.e. teir framleiga sendingar-/innsløg og síðani verða hesi seld til sjónvarpsrásir kring heimin. Tað er sjálvandi myskt, hvussu væl umtókt tey ymisku innsløgini. Men teir hava selt til fleiri enn hundrað lond millum ár og dag, og David heldur, at innsløgini um Føroyar fara at vera væl umtókt.

Tað, at onkur ger innsløg ella skrivar um Føroyar og føroyingar er ikki nakað sjálvsamt í sjálvum sær, men hetta er ein av fáa ferðum, helst fyrstu ferð, at AP vitjar í Føroyum.

David Norman-Watt hevur seinastu tvey árini ferðast í nógvum londum, har hann hevur gjørt sjónvarpssendingar.

Hann hevur eisini verið á okkara leiðum áður, tí hann hevur verið tvær ferðir í Grønlandi, og seinni í hesum mánaðinum skal hann til Ískands at finna tilfar.

Olja og sjálvstýri

Sendingin, sum David Notman-Watt arbeiðir við, eitur Roving Report. Hetta er tað slagið av sendingum, sum verður rópt »Current affairs«. Roving Report ferðast kring allan heim. Aloftast er tað einans ein, sum fer avstað, men okkurt serstaka stórt, verður farið avstað við fleiri fólkum. Tá tað so einans er ein í Føroyum, so sigur tað kanska eitt sindur um Føroyar, men David sigur, at hann dámar satt at siga best at arbeiða einsamallur, og hann er eisini einsamallur hesaferð.

Á sínari vitjan í Føroyum, er tað serliga tvey evni, ið hann hevur lagt seg eftir at lýsa. Talan er um ríkisrættarligastøðuna og tað møguligu oljuvinnuna. Serliga hetta seinna evnið er áhugavert og aktuelt, sigur David.

Tá hann so hevur verið í Føroyum, so hevur hann eisini fingið aðrar søgur við, sum hann so at siga er dottin á. Ein av hesum søgunum var nemliga Brødrene Olsen, men eisini aðrar smásøgur hava stungið seg upp, og David sigur, at hetta er nakað, sum eyðkennir Roving Report, t.e. innsløgini byggja oftani á »vanlig« menniskju, ið hava eina søgu at siga frá.

David sigur seg hava lært nógv um Føroyar, meðan hann hevur verið her. Eisini sigur hann seg vera bergtiknan av teirri vøkru náttúru, sum er í Føroyum.

-Tit hava eitt ómetaliga vakurt land, og fyri ein sjónvarpsmann er stuttligt at gera upptøkur í slíkum landslagi. Litirnir eru sterki, og eg havi fingið nakrar av mínum bestu myndum nakrantíð á ferðini í Føroyum, sigur David Notman-Watt.

Hann væntar, at innslagið um føroyska oljuvinnu fer at verða liðugt um einar tríggjar vikur, men tað er sera torført at siga, nær innslagið fer at vera sent í sjónvarpsrásan kring heimin, tí tað er ymiskt nær tær ymisku rásirnar keypa rættindini.

Óheft

Áðrenn David fer avstað, ger hann hópin av arbeiði áðrenn, t.e. sokallað »Research«. Hann sigur tó, at tað er nógv, sum hann lærir, meðan hann er á staðnum, men hann roynir at vera væl fyrireikaður.

Vitjanin í Føroyum hevur ikki verið drúgv, men hann sigur seg vera nøgdan við vitjanina, tí hann hevur tosað við fleir fólk, og tað eru oftani tey vanligu fólkini, sum hann leggur seg eftir at tosa við.

Hesar dagarnar, sum hann hevur verið her, hevur hann m.a. tosað við Høgna Hoydal, landsstýrismann, men hann hevur eisini verið ein túr í Klaksvík, har hann m.a. tosaði við Steintór Rasmussen.

-Eg royni at koma inn í landið, geri nøkur innsløg og síðani fara eg avstað aftur, sigur David. Hann leggur dent á, at hansara innsløg í allar mátar eru óheft, og hann ikki ger nakrar niðurstøður, men roynir heldur at lýsa tingini útfrá útsagnunum hjá teimum ymisku fólkunum.

David Norman-Watt fór avstað aftur týsdagin. Nú bíða fleiri dagar, har hann skal klippa og skipa upptøkurnar, sum hann hevur gjørt í Føroyum.

Hetta verður so í øllum førum ein møguleiki hjá fólki kring allan heim at síggja okkum føroyingar.

Arbeiða aftur undir Vestmannasundi

Mánadagin fór arbeiðið at spreingja tunnil undir Vestmannasund aftur í gongd, eftir at øll starvsfókini, bæði í tunnlinum og í umsitingini, hava verið í feriu í tríggjar vikur

VÁGATUNNIL
Rúnar Reitrup

Nú koyra lastbilar aftur inn og út úr tunnilsmunnunum í Leynum og á Oyragjógv við gróti, sum er sprongt burtur fyri at geva pláss fyri fyrsta føroyska undirsjóvartunnlinum.

Øll fólkini, sum hava sítt dagliga yrki í samband við Vágatunnilin, hava verið í feriu hesar seinastu tríggjar vikurnar, og arbeiðið at gera tunnilin hevur tískil ligið stilt. Men mánadagin møttu tey so øll aftur, og fóru í gongd.

Dávid Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunnlinum, sigur, at tey valdu heldur at steðga arbeiðinum fullkomuliga í tríggjar vikur og so fara í gongd aftur við fullari styrki, enn at lata fólk fara í feriu so við og við.

– So høvdu vit muga koyrt við hálvum blussi alt summarið. Tí tað er ikki sum at siga tað at taka avloysarar inn í eitt slíkt arbeiði, sigur Dávid Reinert Hansen.

Hálvantriðja kilometur

Nú byrjað varð at spreingja aftur mánadagin, var holið Streymoyarmegin 1664 metrar djúpt, og Vágoyamegin vóru teir komnir 882 metrar inn. Tað verður nú arbeitt undir havinum á báðum síðum. Streymoyarmegin eru teir komnir 150 metrar út undir Vestmannasund, og Vágoyamegin eru teir júst komnir út undir sundið. Her fer arbeiðið í løtuni fram 56 metrar undir havbotninum. Streymoyarmegin eru teir 66 metrar undir havbotninum.

Arbeiðið gekk sera væl áðrenn farið varð í feriu, og nú heldur tíðarætlanin aftur. Har komu annars stórar seinkingar fyri sum avleiðing av verkfallinum fyrr í ar, men við tað at arbeiðið at gera tunnilsvegin Vágoyarmegin varð liðugt ein mánað fyrr enn væntað, bar til at vinna mistu tunnilsmetrarnar aftur.

Eru uttan fyri Kvívík

Tunnilsgerðin Streymoyarmegin fer nú fram undir havbotninum stutt uttan fyri Kvívík. Og tá sprongt verður í tunnlinum, hoyra og merkja fólk í bygdini rumbulin. Hetta fara tey at gera í eina tíð enn, tí tunnilin skal so at siga spreingjast framvið bygdini.

Men ristingarnar eru tó eingin trupulleiki. Ein ristingarmátari varð fyrr í ár settur inn í summi av húsunum í bygdini, og hann vísti, at tær harðastu ristingarnar ikki vóru, tá tunnilsarbeiðarnir sprongdu, men tá úthurðarnar blivu smekkaðar.

Streymoyarmegin varð tunnilsgerðin seinkað nakað av einum stórum leka fyrr í ár, og hóast tað enn verða pumpaðir einir 180 litrar av vatni um minuttin út úr tunnilsmunnunanum í Leynum, so er tað langt undir mestamarkið fyri hvussu nógv vatn kann leka í tunnilin.

Tunnilin verður ongantíð tettur heilt, tí tað loysir seg heilt einfalt betur framhaldandi at pumpa vatnið burtur – eisini tá tunnilin einaferð stendur liðugur.

Ætlandi skal tunnilin undir Vestmannasund verða klárur at taka í nýtslu á vári 2003.

Sjófólk kannast øðrvísi

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við sjóvinnumálum, hevur sett eina nýggja kunngerð í gildi um læknakanning av sjófólki, sum millum annað setir størri krøv til læknaførleikan

LÆKNAKANNING
Rúnar Reistrup

Nú skulu kommunulæknar vera »góðkendir sjóvinnulæknar« fyri at kunna standa fyri læknakanningum av sjófólki.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við sjóvinnumálum, hevur sett eina nýggja kunngerð um læknakanning av sjófólki í gildi, sum kemur ístaðin fyri ta kunngerð, sum hevur verið galdandi á økinum síðan 1996. Tað hevur millum annað við sær, at kommunulæknar skulu á eitt serligt skeið í sjóvinnulæknafrøði, áðrenn teir kunnu seta sítt navn undir eina heilsuváttan fyri sjófólk.

Flestu av landsins kommunulæknum hava longu verið á hesum skeiði, sum Sjóvinnufyrisitingin og Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu skipaði fyri seinasta heyst, og teir hava harvið fingið góðkenning sum »sjóvinnulæknar«.

Kannast 2. hvørt ár

Nýggja kunngerðin hevur ymsar aðrar broytingar við sær eisini. Kommunulæknin fær nakað víðari ræsur nú enn fyrr, við tað at hann nú kann standa fyri sjónkanningum av sjófólki. Sjónkanningarnar eru avgerandi fyri, um viðkomandi verður mettur egnaður at standa á kægi á brúnni. Fyrr var tað bert eygnalæknin, ið kundu standa fyri hesi sjónkanning

Heilsuváttan krevst av øllum sjófólki, ið mynstra við føroyskum skipi uppá 20 tons ella meira. Sjófólk skulu lata seg kanna annaðhvørt ár, tó skulu sjófólk millum 15 og 17 ár til kanningar hvørt ár. Kanningin er ókeypis fyri sjófólkini.